

# rýstu á play

bólki, men tónleikurin hjá Nik og Jay hóskar sera væl til henda leistin við einum DJ, og væl poleraði poppurin bleiv leveraður sum hann skuldi. At Morten Breum eisini er ein somikið feitur DJ, at hann í støðum kláraði at geva teimum eitt sindur av kanti, gjørdi als ikki upplivingina verri.

Fjøldin var við frá fyrsta lagnum "I Love Ya", og tá teirra størsta hitt "Lækker" bleiv spælt sum næsta lag, kókaði á Vágsbø, og fjøldin slapp at syngja við í hittum sum "Boing", "Elsker hende mere", "En dag tilbage" og "Hot".

Eftir ein góðan tíma komu rapparin Jinx og sangarin Joey Moe á pallin, og spældu fleiri løg, harav nøkur hjá Joey Moe. Tíverri livdi hesin partur av konsertini ikki heilt upp til fyrra partin. Løgini hjá Nik og Jay vóru tað meira fangandi enn tey hjá Joey Moe. Eisini var sukursøta røddin hjá Joey Moe, tað sukuri oman á Candyflossið, ið gjørdi, at eg ikki kláraði at svølgja.



# Innrás úr Gøtu á Summarfestivalinum

**Pætur Zachariasson, sangari í Boys In A Band, helt, at teir kanska vóru fyrsti gøtubólkur, sum hevur spælt á Summarfestivalinum. Nú veit eg ikki, hvør definitiónin av einum gøtubólki er, men Boys In A Band hava í øllum førum gjørt eina ordiliga innrás í Klaksvík og vunnið nógv áskoðarahjørtu við framførsluni í gjárkvøldið**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Um Boys In A Band nakrantíð hava spælt eina vánaliga konsert veit eg ikki, og ja, eg loyvi mær at ivast, eftir at hava upplivað teir ferð eftir ferð, at teir eru betur enn teir vóru seinast eg sá teir.

So væl vitandi, at eg havi skrivað nøkulunda tað sama fleiri ferðir fyrr, so var konsertin á summarfestivalinum enn ein frálík konsert við hesum frálíka bólki.

Heilt fitt av fólki var savnað í Flagstjaldinum, og tey sluppu at dansa við til nærum øll løgini av Black Diamond Train fløguni. Á skránni var bert eitt nýggjari lag, sum eg ikki kendist við. Hetta lag minti nógv um tað, ið vit kenna frá bólkinum annars, og boðar frá, at stílurin verður hildin.

Boys In A Band eru ein heilt serligur bólkur, og hóast tveir av upprunalimunum ikki spældu við á hesari konsertini, so er bólkurin akkurát líka serligur.

Tá bassleikarin Símun fyri einum góðum ári síðan fór burturúr bólkinum, fylti Sakaris Joensen úr Lama Sea hansara skógvar væl og virðiliga. Tað sama er galdandi nú trummuleikarin Rógvi ikki fekk spælt við í summar vegna diskos prolaps, aftur varð leitað til høvuðsstaðin eftir avloysara, og Andreas Dalsgaard úr The Story Ends leveraði vøruna. Hann virkaði fullkomiliga natúrligur í leiklutinum, og eg hevði torført við at ímynda mær, at tað kundi gerast betur enn hatta.

Mest fasinerandi er tó sangarin Pætur, ið við sínum garr-etandi-øra kropsmáli og dansi er ein heilt egin uppliving.